# Fíggjarmálaráðið undirgrevur arbeiðspláss hjá fiskimonnum



*- Handverkarar kunnu ikki nýtast sum grundgeving hjá Fíggjarmálastýrinum fyri at lækka frádráttin hjá fiskimonnum, heldur Fiskimannafelagið.*

**– Er frádrátturin hjá føroyskum fiskimonnum uttanlands skerdur við vilja, er einki at gera. Men er hetta eitt mistak, eigur ein loysn at verða funnin, sigur Føroya Fiskimannafelag, sum hevur eitt uppskot um, hvussu hetta kann gerast**

FRÁDRÁTTUR
*Beinta Anthoniussen, starvsnæmingur*

Í blaðnum týsdagin høvdu vit samrøðu við kollfirðingin, Jógvan Fagraklett, sum siglir og umboðar føroyskar fiskimenn í Danmark.

Í samrøðuni fanst hann at skerda frádráttinum hjá fiskimonnum og vísti á tað skeiva við, at fiskimenn og handverkarar uttanlands eru undir somu skipan við sama frádrátti.

### FF átalar

Í seinastu ársfrágreiðing Fiskimannafelagsins sigur felagið, at Fíggjarmálastýrið undirgrevur arbeiðspláss hjá fiskimonnum uttanlands.

– Tað er eingin ivi um, at føroyska samfelagið hevur áhuga fyri so nógvum arbeiðsplássum uttanfyri Føroyar sum gjørligt. Hetta er eisini gjaldandi fyri fiskimenn. Øll vita, at tað er mark fyri, hvussu nógvir fiskimenn rúmast umborð á føroyska fiskiflotanum. Tí ræður um at gera tað møguligt at fáa so nógvum føroyskum fiskimonnum sum gjørligt møguleika at kunna fiska við útlenskum fiskiskipum, samstundis sum teir kunna vera búgvandi í Føroyum, sigur Fiskimannafelagið og vísir á, at eitt av endamálunum við fiskimannaskattinum var júst at gera hetta møguligt.

– Men tað tykist, sum kunngerðini um frádrátt fyri arbeiði og sigling uttanlands mótarbeiðir hesi ætlan. Kunngerðin ásetir, at tann frádráttur, sum var gjaldandi fram til 1. januar í ár og sum var kr. 300 ella kr. 400 um samdøgrið - alt eftir um arbeitt varð í norðurlondum ella ikki - er lækkaður til kr. 100. Av hesum eru kr. 50 fyri kost, kr. 20 fyri húsleigu, kr. 25 fyri ferðakostnað og kr. 5 fyri tryggingar. Skipanin er soleiðis, at verður ein postur av hesum útreiðslum goldin av øðrum, so minkar frádrátturin samsvarandi.

Fiskimannafelagið vísir til tey einstøku liðini í nevndu kunngerð:

### Vistarhald, húsaleiga og ferðaútreiðslur

Skattalógin sigur greitt í §29, stk. 11, at "til skattskylduga inntøku teljast ikki virði av vistarhald hjá sjófólki umborð."

Við føroyskum skipum hevur ongantíð verið ivi um, hvussu henda regla skal skiljast. Proviantur (vistarhald) hevur sambært sáttmálan verið goldin av fiskimonnum uppá tríggjar mátar. Teir eru: 1. Fríur proviantur, 2. Proviantur fer av óbýttum ella 3. Manningin rindar sjálv allan proviantin. Í øllum førum hava menn verið skattaðir av tí, sum er útgoldið, eftir at proviantur er trektur frá, uttan mun til hvørja støðu proviantur hevur í sáttmálanum.

– Men her hevur Fíggjarmálarðið sett aðrar reglur fyri fiskimenn við útlendskum skipum. Har fiskimenn gjalda sín egna proviant, verður hesin ikki roknaður sum skattafrí veiting. Hetta meta vit at vera heilt skeivt og í stríð við praksis við føroyskum skipum í eini 40 ár- heilt síðani provinatur gjørdist skattafríur.

Eitt annað er, sigur felagið, at her verða 50% av tí samlaða frádráttinum mótroknað kostfrádráttinum, sum er 100 um dagin. T.v.s. at frádrátturin er bert helvtin av tí, sum provianturin reelt kostar. Annars kann sigast, at tá almenn tænastufólk fara uttanlands at ferðast, fáa tey einar kr. 500 at eta fyri um dagin – skattafrítt; tað er 10 ferðir so nógv, sum ætlað er einum handverkara ella fiskimanni. So her er mannamur, so tað forslær.

Húsaleigan er sett til kr. 20 um dagin ella 600 um mánaðin.

– Vit kunnu bert út frá leiguprísunum í Havn meta um, hvussu nógvar dagar í einum mánaði tað ber til at leiga t.d. eitt kamar fyri hesa upphædd. Í besta føri røkkur hettar til helvtina av mánaðinum. Men hendan reglan rakar nærum ikki fiskimenn, tá teir búgva umborð, vísir Fiskimannafelagið á.

Ferðaútreiðslur eru settar til kr. 25 um dagin, ella kr. 750 um mánaðin

– Um roknað verður við, at tað er hóskandi at sleppa heim eftir tveimum mánaðum, so verður samlaði frádrátturin kr. 1.500. Hetta er minni enn ein ferðaseðil kostar bert annan vegin og bert í Danmark. Úr øðrum londum røkkur henda upphædd munandi minni. Helst ber tað als ikki til hjá fiskimonnum, búsettir í Føroyum, at sigla t.d. við kanadiskum skipum.

### Einki samsvar

Felagið sigur, at fiskimenn í Danmark, sum FF hevur tosað við, meta seg at brúka kr. 18.000 í ferðing árliga. Við 180 døgum kann teirra frádráttur gerast kr. 4.500, sum er umleið 25% av kostnaðinum.

– Verða kostur og ferðing løgd saman, missa fiskimenn kr. 18.000 í frádrátti í mun til veruligu útreiðslurnar, og hava teir harvið fingið eina skattahækking uppá kr. 9.000 ella meira enn tað.

FF heldur tað vera heilt burturvið, at als einki samsvar er millum frádrátt í mun til veruligu útreiðslurnar.

– Tað kundi t.d. verið eitt sindur av logikki at havt eina "sjálvrisiko" eins samsvarandi tann ferðastudning, ið er galdandi fyri fólk, sum í Føroyum búgva einastaðni og arbeiða aðrastaðni. Hesin var eftir gomlu lógini kr. 3.000 árliga, sum man svara nøkulunda til galdandi reglur, meðan tað hjá løntakarum uttanlands er talan um heilt aðrar upphæddir. Her verður eisini gjørdur mannamunur til skaða fyri útlendsk arbeiðspláss.

### Munurin millum handverkarar og fiskimenn

FF vísir í ársfrágreiðing síni á, at grundgevingin hjá Fíggjarmálastýrinum fyri lækkingini av ferðafrádráttinum er at fáa handverkarar at flyta heim aftur, nú so nógv er at gera í Føroyum.

– Men hendan grundgevingin kann als ikki nýtast mótvegis fiskimonnum, tí teir hava so eingi skip at koma heim til. Mótvegis fiskimonnum uttanlands, vísir hendan kunngerðin eina sera lítla virðing fyri teirra starvi og tann týdning, sum teir hava fyri føroyska samfelagið. Avleiðingin kann tí væl verða, at hesir fiskimenn aftur stinga í sekkin, og tá hava vit sagt farvæl til hesar borgarar og teirra arbeiðspláss fyri well.

### Uppskot

– Er alt hetta gjørt við vilja, so er sjálvsagt einki at gera. So kunnu vit bert síggja, at meðan ein partur av landsstýrinum roynir at økja okkara arbeiðsmarknað við arbeiðsplássum uttanlands, roynir annar partur av landsstýrinum at forpurra hetta.

Felagið heldur, at er hetta hinvegin eitt mistak, eigur ein loysn at vera, at fiskimenn uttanlands verða skattaðir á sama hátt sum við føroyskum skipum av provianti, t.v.s. sleppa undan skatti.

– Tær kr.100 kunnu so óskerdar verða frádráttur sum endurgjald fyri ferðing. Hesar vilja svara nøkulunda til kostnaðin. Men tá má í hvussu er takast hædd fyri teimum fiskimonnum, sum hava størri útreiðslur, enn her er talan um.



**Arbeiðið við at byggja virkið, sum skal taka í móti og sóttreina slógv frá alivinnuni, er í gongd, og væntandi fer virkið undir at taka í móti slógvi í summar**



*Farið er undir at byggja virkið hjá Salmon Proteins á Eiði, sum skal taka í móti og sóttreinsa slógv frá føroysku alivinnuni*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Reinsivirkið verður nú bygt á Eiði

SÓTTREINSAN
*Edvard Joensen*

**Eiði:** Arbeiðið upp á virkið hjá Salmon Proteins á

Eiði gongur eftir ætlan. Væntandi verður farið undir framleiðslu í summar, sigur stjórin.

Jógvan Emil Nielsen, stjóri á Slamon Proteins, sigur, at í grundini eru teir eitt sindur framman fyri tíðarætlanina við sjálvari byggingini.

Eisini er avtala gjørd við flutningsfelag, sum skal taka sær av at flyta alt slógvið frá føroysku alivirkjunum til virkið á Eiði. Tað eru Hans Egil Joensen og synir av Eiði, sum hava fingið flutningin. Teir fara nú at gera onkrar íløgur í bil og tangar, soleiðis, at klárt er at byrja, tá virkið er klárt.

Jógvan Emil Nielsen sigur, at virkið fer at taka í móti slógvi frá øllum alibrúkum í landinum. »Rávøran«, um tað kann nevnast so, er býtt í tvey. Slógv frá deyðum ella sjúkum fiski, og vanligt slógv frá kryvjivirkjunum frá fiski, sum tikin er á vanligan hátt.

Eisini verður viðgjørda vøran seld í tveimum, sigur hann. Tað, sum kemur frá sjúkum ella deyðum fiski, kann ikki brúkast til annað enn minkafóður. Hitt, sum kemur frá vanligu tøkuni, verður brúkt aftur í fóðurframleiðslu til eitt nú alifóður. Vøran verður seld fóðurframleiðarum í Noreg og Danmark, sigur Jógvan Emil Nielsen.

Tað verður ikki gjørt annað við slógvið enn, at tað verður kókað, so øll møgulig smitta doyr. Síðan verður tað í tangum flutt av landinum.

Sum er flyta alistøðirnar sjálvar alt slógvið óviðgjørt av landinum, og tað kostar teimum væl av pengum.

Tá virkið á Eiði er komið í gongd, verður viðgjørda slógvið fyrst savnað í stórar tangar og síðan flutt við tangaskipum til keyparar uttanlands, sigur Jógvan Emil Nielsen, Tað fer at spara útflytarunum nógvar pengar, væntar hann.

Hinvegin skal so alt flytast til Eiðis við bilum, og tað kostar sjálvandi eisini nakað, men verður ein sparing í mun til verandi skipan.

– Talan er í grundini um eitt ES krav, vit hava gingið undir í samband við veterineravtaluni, vit gjørdu, sigur stjórin á Salmon Proteins. Har verður kravt, at slógv skal vera viðgjørt í tí landinum, tað kemur frá.

Sum er gjalda alararnir nógv fyri at sleppa av við slógvið. Teir koma framvegis at gjalda fyri tað sjúka slógvið, men vit fara við hesum virkinum at lætta munandi um flutningsútreiðslurnar yvirhøvur, sigur Jógvan Emil Nielsen.

Tað eru nakað oman fyri 20 partaeigarar í felagnum Salmon Proteins, Tað eru føroysku alifyritøkurnar umframt Havsbrún og Føroya Fiskavirking. Eini fýra fólk fara at arbeiða á virkinum, tá farið verður í gongd í summar.

# Lítil fótbóltsstuðul í Vágum

**Áhugin fyri at stovna stuðulsfelag hjá FS Vágum tykist sera lítil. Bara eini seks-átta fólk møttu á stovnandi aðalfundi sunnudagin**

STUÐULSFELAG

Stovnandi aðalfundur av stuðulsfelag hjá fótbóltssamtakinum í Vágum, FS Vágum, varð hildin sunnudagin. Lítil áhugi tykist fyri at stuðla fótbóltinum.

Bara eini seks-átta fólk møttu á stovnandi fundinum, siga fyrireikararnir.

Kortini varð ein trímannanevnd vald, sum skal arbeiða víðari við at fáa eitt rættiligt stuðulsfelag upp at standa.

Krøvini til fótbóltin í dag eri so stór, siga fyrireikararnir, at teir meta tað avgjørt neyðugt við einum slíkum felag.

**ej**

Til Sølu



Silverton 32 fót glastrevabátur. Hevur tveir motorar, og er væl útgjørdur. Báturin er góðkendur til 12 ferðafólk.
- Til sølu fyri sámuligan prís -

Fyri at frætta meira. Ring 223336
*- Best eftir døgura -*